Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Bjarni Hammer, løgtingsmaður

Svarari: Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fíggjarumálum

Evni: Verklagslóg um Fámjinstunnilin

Spurningar:
1. Hvør er orsøkin til, at verklagslógin um Fámjinstunnilin ikki er løgd fyri Løgtingið, nú framløgufreistin er farin?
2. Nær kann væntast, at verklagslógin um Fámjinstunnilin verður løgd fyri Løgtingið?
3. Nær kann arbeiðið byrja uppá Fámjinstunnilin?

Viðmerkingar:
Løgtingið hevur samtykt, at Fámjinstunnilin skal gerast, og peningur er settur av til endamálið. 3 mió. kr. vórðu játtaðar til verkætlanina í 2020, tað var til prosjektering og fyrireikingar. Í 2021 eru 25 mió. kr. játtaðar, og eftir ætlan verða 63 mió. kr. játtaðar í 2022 og 30 mió. kr. í 2023. Øll verkætlanin er mett at kosta 103-125 mió. kr.
Landsstýrismaðurin hevur boðað frá, at arbeiðið byrjar í summar. Men fyri at arbeiðið veruliga kann byrja, má ein verklagslóg samtykkjast áðrenn. Seinasti framløgudagur var fríggjadagin 5. mars, og tá var verklagslógin ikki millum lógaruppskotini frá landsstýrinum.
Fámjiningar og suðuroyingar í síni heild eru farnir at stúra fyri, um arbeiðið fer at byrja í summar, sum landsstýrismaðurin hevur boðað frá, nú ongin verklagslóg fyriliggur. Men sjálvt um ongin verklagslóg fyriliggur í dag, kann landsstýrismaðurin við 17 undirskriftum enn náa at koma í Løgtingið við verklagslógini, áðrenn Løgtingið fer í summarfrí, soleiðis at arbeiðið kann bjóðast út og byrja í summar.
Tí verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 19. mars 2021

Bjarni Hammer